


Nýggj bók:

## Malan og Rasmus = sannheit

Malan og Rasmus = sannheit er ungdómsbók eftir kenda svenska rithøvundin Moni Nilsson-Brännström, ið millum annað hevur skrivað bøkurnar um Tsatsiki.

Malan, sum vit kenna frá bókini Seturskúlin frá 2005, er framvegis forelskað í Rasmusi. Bókin lýsir væl teir spenningar, ið kunnu vera millum gentu og drong, um hvussu langt tú vilt fara, sjalusi og aðrar kenslur, ið gera seg galdandi, tá ið tað trupla kærleikslívið skal røkjast. Bergur Rasmussen týddi.

Bókin er 195 bls., heft við klaffum og kostar 150 kr.

Nýggj bók:

## Regin og Sára

Regin og Sára er nú uppafturprentað. Heini Hestoy fekk Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs fyri bókina fyri sekstan árum síðan. Bókin er til tey 11-13 ára gomlu, og hevur leingi verið útseld. Søgan er um Regin, hvørs pápi situr fongslaður í Danmark fyri stuldur. Regin hittir ta djørvu Sáru, sum, hóast hon er blind, ikki er ein, ið fellir í fátt. Saman royna tey at vinna á trupulleikunum.

Bókin er 116 bls., innbundin og kostar 160




# Borgarstjórin í Havn ónøgdur við Tjóveldisflokkin

**Tvær ferðir í seinastuni hevur Tjóðveldisflokkurin atkvøtt ímóti síni egnu samgongu og borgarstjórin heldur, at tað er óheppið. Hann fer nú at taka málið upp í samgonguni**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan í Býráðnum í Havn sveimar ikki á ljósareyðum skýggjum. Í seinastuni hava tvey dømi verið um, at samstarvið í samgonguni ikki gongur sum smurt. Hóskvøldið atkvøddi Leivur Hansen ímóti restini av samgonguni í málinum um at keypa Skeiva Pakkhús og tað gjørdi at málið fall. Fyrsti stuttum atkvøddu tveir tjóðveldismenn ímóti samgonguni um at keypa Roykivirkið í Álakeri og tað málið fall eisini.

Heðin Mortensen dylir ikki fyri, at hann heldur tað vera óheppið, at tjóðveldisflokkurin tvær ferðir á rað atkvøður ímóti síni egnu samgongu.

- Tjóðveldisflokkurin er sjálvur við í samgonguni og tí er tað ikki nøktandi, at flokkurin á tveimum teimum seinastu býráðsfundunum atkvøður ímóti restini av samgonguni.

Heðin Mortensen hevur ikki so nógvar viðmerkingar til málið enn. Men hann sigur, at hetta er eitt mál, sum hann fer at taka upp í samgonguni so at tey fáa tosað um støðuna.

- Tað er óheppið, at samgongan ikki stendur saman um tær ætlanir sum eru og at tjóðveldisflokkurin ístaðin atkvøðir saman við andstøðuni.

So kunnu býráðslimir hava sínar egnu meiningar, men tað er óheppið, at samgongan ikki stendur saman.

Annars heldur borgarstjórin ikki, at hesi málini tørva politiska viðgerð, tí tey eru umrødd leingi. Hann skilir heldur ikki, at tað ber til at brúka orku til at leggja til rættis, hvat virksemi skal vera í einum húsi, sum kommunan ikki eigur. Tað rætta er at keypa húsið fyrst og so leggja vit virksemið til rættis aftaná, heldur borgarstjórin.



*Borgarstjórin í Havn heldur, at framferðin hjá Tjóðvdeldisflokkinum er óheppin*

# Eg havi ikki forbrotið meg ímóti samgonguni

**Leivur Hansen heldur, at vil borgarstjórin hava samgonguna í Tórshavnar Býráði at semjast, má hann eisini taka ta tíð, sum krevst, fyri at finna semju**



*- Vil borgarstjórin hava eitt mál samtykt, má hann tryggja sær undirtøku fyri tí fyrst, heldur Leivur Hansen*

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg haldi ikki, at vit í Tjóðveldisflokkinum í Tórshavnar Býráði hava gjørt nakað skeivt.

Leivur Hansen heldur ikki, at borgarstjórin í Havn hevur nakra orsøk at finnast at honum.

Sum tað sæst í aðrari grein, er borgarstjórin í Havn misnøgdur við framferðina hjá Tjóðveldisflokkinum í Tórshavnar Býráð.

Hóast Leivur Hansen er í samgongu, hevur hann tvær ferðir í seinastuni atkvøtt ímóti samgonguni.

- Fyrru ferð var, tá ið Roykivirkið í Álakeri skuldi keypast og aðru ferð var, tá ið Skeiva Pakkhús skuldi keypast.

Bæði málini fullu.

- Men eg veit onki um, at hetta hava verið samgongumál og tí hevur hvør býráðslimur rætt at atkvøða eftir bestu sannføring.

Leivur Hansen sigur, at málini hava ikki fingið neyðugu politisku viðgerðina.

- Vil borgarstjórin hava samgonguna at semjast, má hann brúka ta tíð, sum krevst fyri at finna semju, sigur hann.

- Tað er ikki gjørt í hesum føri og tí havi eg mælt til, at málini byrja, har tey eiga at byrja og tað er í mentanarnevndini.

Leivur Hansen staðfestir kortini, at hann er framvegis í samgongu.

- Vit hava eitt samgonguskjal, har vit hava bundið okkum til ávís politisk tiltøk. Tað standa vit við. Men stinga onnur mál seg upp, er ikki talan um samgongumál, serliga tá ið tey ikki verða viðgjørd sum samgongumál og sostatt kann hvør atkvøða eftir bestu sannføring. Vil borgarstjórin hava tey samtykt, má hann tryggja sær undirtøku fyri tí fyrst.

Leivur Hansen heldur ikki, at tað er rætt at keypa Skeiva Pakkhús, fyrrenn vit vita, hvat húsið skal brúkast til.

At borgarstjórin heldur eitt annað, er so hansara støða.

Hann vísir á, at býráðið hevur eisini onnur hús, sum standa tóm. Müllers Pakkhús er partvís tómt og Degns hús standa tóm. Vit kunnu ikki blíva við at keypa tóm hús, uttat at vita, hvat tey skulu brúkast til.

- Vit mugu eisini fylla tey hús, vit eiga, við lívið, sigur Leivur Hansen.

## Vil hava betri undirvísing og betri skúlabøkur

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin vil nú hava Løgtingið at játta meiri pening fyri at fáa betri skúlabøkur og fyri at styrkja byrjunarundirvísingina í fólkaskúlanum.

Fríggjadagin legði flokkurin sostatt fram tvey uppskot fyri Løgtingið um at játta meiri pening til hesi endamál.

Í fyrru atløgu vil flokkurin hava Løgtingið at játta 3,5 milliónir afturat til byrjunarundirvísing í fyrsta, øðrum og triðja flokki frá næsta skúlaári. Peningurin skal nýtast til at hækka tímatalið fýra tímar um vikuna í fyrsta, øðrum og triðja flokki, sigur Tjóðveldisflokkurin í tíðindaskrivi

Men flokkurin leggur dent á, at hann vil hava, at allir flokkar í landinum skulu fáa sama tímatal, so at munurin, sum er í dag er á tímatalinum í minnu bygdaskúlunum og í størru skúlunum, verður javnaður.

Men flokkurin vil eisini, at játtanin aftur verður hækkað næsta ár so at vit í Føroyum hava sama tímatal sum hini Norðurlondini, ella ávikavist 25, 28 og 30 tímar um vikuna í fyrsta, øðrum og triðja flokki.

Somuleiðis vil Tjóðveldisflokkurin hava Løgtingið at samtykkja at játta Føroya Skúlabókagrunni tvær milliónir krónur afturat til skúlabókagerð.

Men flokkurin heldur, at hetta skal bara vera fyrsta stig í eini røð, har játtanin til grunnin verður økt tvær milliónir krónur um árið í trý ár, so at játtanin er komin uppá 11,5 milliónir krónur um árið í 2009.